

*Á Hvítusunnu fer Strandferðslan aftur at skipa fyri útferð runt allar Føroyar við Smyrli. Umborð fer Sputnik at spæla góðan dansitónleik*

# Nógv fólk vilja sleppa Føroyar runt við Smyrli

**Á hvítusunnu fer Smyril at sigla Føroya land og ríki runt og norðoyingar fáa eitt heilt serligt tilboð. Umborð verður góður matur og góður musikkur**

FØROYA-RUNDFERÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Síðstu páskir gjørdi Smyril eina sera væleydnaða ferð runt alt landið við einum 900 ferðafólkum.

Og nú á Hvítusunnu fer Smyril at gera eina slíka útferð afturat.

Heini á Borg á Strandferðsluni, sigur, at tað er stórur áhugi fyri at fara við og nógvir ferðaseðlar eru longu seldir, hóast tað enn er meiri enn ein vika, til útferðin verður

Í hesum sambandi er ætlanin at geva norðoyingum eitt heilt serligt tilboð.

Heini á Borg sigur, at ætlanin er at bjóða norðoyingum at fara til Suðuroyar við bili leygarmorgun, hvítusunnuaftan, 26. mai.

Síðani ber til at fara rundferð í Suðuroy leygardagin og umborð á Smyril at gista um kvøldið.

Tað ber eisini til at fara suður um kvøldið og gista umborð.

Fyrsta hvítusunnudag er morgunmatur umborð sjálvandi við í prísinum.

## Sigla eftir veðrinum

Sjálv rundferðin byrjar klokkan níggju um morgunin fyrsta hvítusunnudag, tá ið Smyril loysir av Krambatanga á Trongisvágsfirði.

Síðani verður siglt runt Suðuroy og til Havnar, har tey ferðafólk sleppa við, sum halda, at tað er ov nógv av tí góða eisini at fara runt um Suðuroynna.

Á miðdegi verður lagt av aftur Havnini og síðani verður siglt runt Føroyar.

Hvønn veg leiðin gongur, veldst um, hvussu veðrið er tann dagin, tí siglt verður bara eftir veðrinum.

Heini á Borg sigur, at umborð, verður stór buffet, eins og tann fínara matstovan verður opin.

Á ferðini verður eisini skipað fyri undirhaldi til børnini.

Annars fer legendariska suðuroyarorkestrið, Sputnik at spæla á ferðini, so verður hugurin at strekkja beinini við einum valsi, fer tað eisini at bera til.

Og allan vegin fer Ólavur Hansen, sum er øgiliga staðkendur, at greiða frá tí, sum er at síggja, har Smyril siglur.

Samstundis verður eisini skipað so fyri, at ferðafólkið sleppur upp á brúnna og niður í maskinrúmið at síggja, hvussu alt sær út.

Tey, sum hava hug at síggja tað allarheilagasta umborð á Smyrli, skulu tekna seg til í móttøkuni á túrinum og so verður skipað fyri túrum fyri umleið 20 fólkum ísenn.

Ferðaseðlar til útferðina eru at fáa frá Strandferðsluni, umborð á Smyrli og á Kunningarstovuni á Tvøroyri.

Ferðaseðlar skulu verða keyptir í seinasta lagi mánadagin.

# Óstøðugt vikuskifti

**- Tað verður óstøðugt veður um vikuskiftið, og síðani kemur kuldi, sigur veðurmaðurin, Petur Skeel Jacobsen**

VEÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



Í morgin kemur eitt djúpt lágtrýst inn yvir oyggjarnar, og førir hetta við sær, at tað verður ælaveður allan leygardagin.

- Men tað verður kortini lýtt í morgin – millum 9 og 12 stig, lovar Petur.

Sunnudagin verður hann vestan og útsynningur í ættini, og tá verður helst turt.

Út á mánadagin verður hann meiri útsynningur í ættini, við ælaveðri og sólarglottum og tað verður heldur kaldari, kanska niður í 4 til 7 stig.

Somu hitastigini halda fram týsdagin og mikudagin, tá Petur eisini væntar vátasletting og 3 til 7 stig.


**Klaksvíkar Sjúkrahús**
Røntgendeildin · Tlf 45 45 45
700 Klaksvík

Fyri at veita brúkarum okkara eina betri tænastu, fara vit frá 21. mai 2007 at hava opið soleiðis:

- **Mánadag** frá kl. 08:00 – 15:00
- **Týsdag** frá kl. 08:00 – 15:00
- **Mikudag** frá kl. 08:00 – 18:00
- **Hósdag** frá kl. 08:00 – 15:00
- **Fríggjadag** frá kl. 08:00 – 15:00
- **Leygardag** frá kl. 11:00 – 14:00



## Alvalon søkir eftir námsfrøðingum

Vit søkja eftir námsfrøðingum at arbeiða 30 tímar um vikuna, at byrja 13. august 2007 ella eftir avtalu.

Í Alvalon eru tað 6 stovur , 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 frítíðarskúli. Í Alvalon eru uml. 100 børn frá 0-8 ár.

**Vit bjóða:**
Eitt áhugavert starv í einum umhvørvi tætt at náttúruni, har tú hevur møguleikan at seta tín dám á stovnin

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**
- Trivnaðin
- Samstarv
- Opinleika

**Vit vænta at umsøkjarnir:**
- Eru tilreiðar at fara virknir í starvið, og saman við sínum starvsfelagum menna tað námsfrøðiliga arbeiði á stovninum
- Hava hug og árræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag, merktan av virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfólkum
- Hava hugsjónir, tá tað snýr seg um virksemi í einum barnagarði/frítíðarskúla
- Eru tilreiðar at luttaka í skeiðvirksemi

**Setunarviðurskifti.**
Løn og setunarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og viðmælum skulu vera:

**ALVALON**
Kjóadalsvegur 2
380 Sørvágur
Tlf: 233240

Í hendi í seinasta lagi 21. juni 2007. Viðmerk. »umsókn«.

Um námsfrøðingar ikki søkja, verða hjálparfólk sett ístaðin í tíðaravmarkað starv.

Sørvágs Kommuna
www.sorvag.fo
VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 332004